# Heilsusúkklingin á Jóansøku 2009

**Í ár er rørsluár, og í tí sambandi skipar Tórshavnar Súkklufelag fyri einum motiónssúkklutúri – í ár í Suðuroynni, á Jóansøku!**

**TÍÐINDASKRIV**

Túrurin í ár gongur úr Vági til Tvøroyri, og er teinurin umleið 18 km langur.

Tórshavnar Súkklufelag hevur gjørt samstarvsavtalu við Tryggingarfelagið Føroyar, og tí verður startur frá avgreiðsluni hjá Tryggingarfelagnum Føroyum í Vági. Málið er við bygningin hjá Tryggingarfelagnum Føroyum á Tvøroyri.

Koyrt verður gjøgnum Hovstunnilin, og tá komið er til Trongisvágs verður koyrt eftir ovara vegi, framvið Suðuroyar Sjúkrahúsi, og síðan á mál við bygningin hjá Tryggingarfelagnum Føroyum.

Í eina tíð hevur Tórshavnar Súkklufelag arbeitt við at skipa fyri einum heilsusúkklutúri. Talan er ikki um eina kapping, men eitt átak, eitt heilsuátak, ið skal betra um heilsuna hjá øllum føroyingum, økja um áhugan fyri súkkling, og fyri at fáa eyguni upp fyri tí at flyta seg á súkklu, heldur enn í bili.

Byrjað verður kl. 10.00, men øll hava møguleika at møta eftir kl. 09.00 og tá fáa eitt sokallað „súkklutjekk", ið inniber at innstilla súkkluna rætt, kanna lufttrýst í dekkunum, kanna bremsur o.a.

Á avgreiðsluni hjá Tryggingarfelagnum Føroyum á Tvøroyri verður so heiðursbræv handað til øll tey sum hava gjøgnumført teinin. Eisini verður ókeypis frukt, vatn, saft, kakao, kaffi o.a. at fáa.

Tilmelding til Heilsusúkklingina 2009 fer fram á øllum skrivstovum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum kring landið, og við at senda teldupost til tsf@olivant.fo.

Les meira um súkkling á www.tsf.fo













